# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**2. sunnudag e. trinitatis**
***Argir:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri J. Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Ann D. Hansen, altargongd, skriftamál kl. 10,40. ***Talvan gongur fyri Føroysku Heimamissiónina***
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Lestur. ***Talvan gongur fyri Føroysku Heimamissiónina***
***Kirkjubø:*** kl. 12, Hanus Simonsen
***Sandavágur:*** kl. 11 David Johannesen.
***Kollafjørður:*** kl. 11, Theodor E. D. Olsen
***Elduvík:*** kl. 12, John Myllhamar
***Kirkjan á Kirkju:*** kl. 12, Hátíðargudstænasta (kirkjan 75 ár) - E. Funding og J. Fríðriksson
***Kl. 17:*** Gudstænasta við altarg., - Bjarni Bæk
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11: Guðstænasta, v/ Henning Bøgesvang
***Christianskirkjan:*** kl. 11, altargangur. Magnus Brahé Jørgensen
***Skopun:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Skálavík:*** kl. 12, lestur, Kingosangarar úr Tjørnuvík
***Hvalba:*** kl 14 Familjuguðstænasta, Símun Jacobsen
***Porkeri:*** kl. 11, altarg., Patrick de Neergaard

**Skálavík fær vitjan av Kingosangarunum sunnudagin!**
Til deknagudstænastuna sunnudagin 1. juni kl. 12 verður Kingosangur á skránni í Skálvíkskirku – har øll sjálvandi eru vælkomin. Tað eru teir vælumtøktu Kingosangararnir úr Tjørnuvík, ið koma at luttaka.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjadagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli.
Sunnudagur kl. 19 Familjumøti v/ Petur Fonsdal Johannesen. Drekka verður aftaná.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 2. juni kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Ann Hansen. Evni: 1. Korintbræv.
Mikudagin 4. juni kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin 4. juni kl. 19.30 í KFUK: Hugnakvøld.

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræti**
Fríggjakvøldið kl. 19 After8, kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Hendrik T. Olsen. Evni: »Tað, sum hendi á apostlanna døgum! Kann tað eisini henda á okkara døgum?«
kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 1. juni kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 12.15: Ungdómsrelaterað møti v/Manuel Delagde o.fl.

**Frá Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Hera Joensen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnumorgun kl. 10.45 Morgunmøti, Barnagudstænasta kl. 11.30.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Ein maður úr India, sum arbeiðir við einum barnaheimi ið Lívdin stuðlar, kemur at greiða frá.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Á tilbiðjunarmøtinum talar Ólavur Jøkladal um evnið »við Kristusi«.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir.

**Adventkirkjan**
Leygardagin 31. mai, bíbliugransking og barnabíbliutími.
Kl. 11, gudstæn. Aase B. Olsen

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14. Møti kl. 18 - Tey ungu skipa fyri.
www.frelsunarherurin.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti. Onki morgunmøti í summar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla. www.gospel.fo

**Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudag kl. 14 Sunnudagskúli, kl. 18 Møti v/ Hera Kjærbo, evni: Veking. Sangur Felags kórið í MH syngur.
Týskvøldið 10/6 kl. 20 Evniskvøld við Steen Palmqust evni: Eg ynski at mítt barn kennir Jesus.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 31.05.2008 kl. 19. Talari: Hallur Sørensen.

**Miðvágs missiónshús**
Leygardagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti vegna felagsmøti í Sandavági.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Missiónshúsið Libanon**
Møti verður sunnudagin 1. juni kl. 18 við Benjamin og Agnar. Eisini er barnaansing og drekkamuður.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20. Ung úr Hvannasundi luttaka við sangi og vitnisburði.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og møti kl. 18.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og Møti kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 1-6-08 kl. 13.30 er sunnudagsskúli og kl. 19.00 møti. Innsamling til húsið. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

**Missiónshúsið á Selatrað**
møti sunnukvøldið kl. 19 v. John S. Myllhamar, trúboðara.
Innsavning til húsið.

**Selatrað**
Leygardagin kl. 19 hevur kirkjuligi útimøtibólkurin útimøti við missiónshúsið. Aftaná verður sangløta í missiónshúsinum. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21: Konsert við Jesus Revolution úr Noreg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Sangur við Biritu Heinesen. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.
Evni: Jesus strangur ella mildur?? við Beintu Berthelsen, Strendur.
Hjartaliga vælkomin.
Á møtinum sunnudagin 1. juni, kl.18. tosar Torleif Johannesen.
Øll eru vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti.
Hanus Simonsen talar evnið: næstakærleiki.
Sunnudagur 1. juni kl. 17 Sunnudagsskúli. Ymiskt á skránni til børnini.
Eisini vit eta náttverða.
Hugskotsmøti
- Sangur / kórsangur
- Náttverði / samverða
- Eitt orð v/Andreas Andreasen.
Mikudagur 4. juni kl. 6:00
Bøn kl. 20 Bíbiltími. Tema: Bønin - Jonleif Danielsen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Kambsdalur, Handilskúlin**
Sunnumorgun kl. 11: Breyðbróting.
Týskvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti, v/ Alt kann henda.
Sunnudagin kl. 16 Familjumøti.

**Aglow, Eysturoy**
Alment møti fyri kvinnur og menn, gentur og dreingir, verður í Kelduni fríggjakvøldið 30. mai kl. 19.30
- Annika og Sigrið tosa og syngja. Lovsangur við Kristinu Hansen.
Byrja verður við einum góðum drekkamunni.
Tit eru ØLL hjartaliga valkomin:)

**Eydnan á Oyrarbakka**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Tummas og Irena Jacobsen, Jógvan Lamhauge og Andreas og Sigrid Ludvig o.fl. tala, syngja og vitna.
Sangur v/ Gunhild og Niclas Leo.

**KFUM & K Klaksvík**
Leygardagin 31. mai M-dagur
kl. 9.00 Morgunmatur
kl. 10.00 Orðaskifti.
Sunnudagurin 1. juni kl. 14 Sunnudagsskúli,
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Sang- og vitnimøti
kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er Konsert við Jesus Revolution
Sunnumorgun kl. 11 er møti v/ Poul Nicolai Steinberg. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ kvinnubønarbólkinum.

**Kunoyar kirkja**
Møti verður í Kunoyar kirkju leygarkvøldið kl. 19.30 Niels Jacob Nielsen trúboðari talar, Óli Poulsen syngur.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Um viðrar verður útimøti kl. 18 við kirkjuna.
Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Fríggjadagin 30. mai kl. 19 Sangvenjing.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Árna og Ásbjørg Kjærbæk.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hov**
Møti í missiónshúsinum sunnudagin kl. 18 við Jógvan Højgaard, trúboðara.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjamorgun kl. 9.30 orðið á borðið, vit minna á árasøluna 31/05.
*Broyting:* Árasølan verður hósdagin 29/5 kl. 19.00, nógvir góðir vinningar. Kaffi og kringla. Øll eru vælkomin at stuðla.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli, kl. 18 Evang møti. Hallur Ludvig talar.

**Sandvík/ Ranhøll**
Sangløta verður leygarkvøldið kl. 20.30. Felagssangur, solosangur,Vitnisburðar, drama og drekkamuður.
Solosangarar: Finnbjørn Nielsen - Svein Petersen - Eddie Bech - Anna Djurhuus, Randi Nolsoe.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 1. juni verður gingið niðan á Slættaberg og út á Bøsdalafoss.
Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er miðal tungur, og gingið verður uml. 4 tímar. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við.
Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur:tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 – 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 – 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
***Túrur til Sands mikudagin 18. juni:***
Gongutúrur saman við Tilhaldsfólkunum á Sandi:
Í fótasporum Kálv lítla.
Frásøgufólk: Marius Clementsen
Døgurði í Húsavík.
Tilmelding: 316491
***Týsdagur***
10.00 – 11.30 Vit syngja Jóhan R. Jacobsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Opið hús
***Mikudag***
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Túrur: Hálsatjørn og Boðanes
Randi / Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur***
10.00 – 10.30 Grundlógardagur stongt
***Fríggjadagur***
10.00 - 17.00 Opið hús
***Mentunarnáttin***
***17.00 - 21.00 Drekkamunnur og Tilhaldspannukøkur v/ Hanusarsúltitoyi***
***21.00 - 22.00 Felagssangur, Simme Jacobsen og Fróði Sandoy***
***21.00 - 22.00 Felagssangur, Simme Jacobsen og Fróði Sandoy***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Borgin**
ger buss-túr til Sandoyar leygardagin 31. mai.
Frá Mentanarhúsinum kl. 8.30 og úr Skopun 20.15.
Tekning á tlf. 444269 ella 224269 í seinsta lagi 27. mai.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Vágs Pensjónistafelag**
ger útferð til norðoyggjar 13.-15. juni um nóg nógvir limir tekna seg. Tekning áðrenn 7. juni á tlf. 373261 ella 373320 (Judith).

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit hava summarsteðg.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.